# Í fjórðingsfinalu uttan landsliðsvenjara

Tað verður ikki Joachim Löw, týskur landsliðsvenjari, sum kemur at standa á síðulinjuni, tá Portugal og Týskland hittast í fjóðingsfinaluni í EM-endaspælinum. Eftir nógv stríð við venjararnar hjá Týskland og Eysturríki, vísti dómarin Löw og Josef Hickersberger út til áskoðararnar, tá hesi hittust í avgerandi dystinum í bólkaspælinum. UEFA hevur nú viðgjørt hendingina, og bæði Joachim Löw og Josef Hickersberger fáa leikbann í ein dag.




# Reyðu leyvurnar umbera

HB-viðhaldsfólkini vóru sera misnøgd við tapið ímóti KÍ í Gundadali mikukvøldið. Summi høvdu eisini hug at finnast at dómarabólkinum eftir dystinum. Á heimasíðuni hjá HB er hendan umberingin frá Red Lions fjepparafelagnum: Vit vilja við hesum biða um umbering fyri niðurgeringina av dómaratoyminum eftir dystin! Hetta skal ikki koma fyri seg aftur. Sæð í ljósinum av keðiliga úrslitinum vilja vit bara biða tykkum bera yvir við okkum!



*Oddaliðið hevur beina kós ímóti FM-heitinum, og aftur í gjárkvøldið øktu teir um munin til hini liðini*

EB/Streymur-B71 2-1 (1-0):

# Gongur einki hjá B71

*EB/Streymur*

*B71*

**Heldur ikki hesa ferð eydnaðist B71 at fáa stig. Seinastu sjey dystirnir hava einans givið eitt stig, og hini botnliðini vinna seg so smátt frá sandoyingum. EB/Streymur vann aftur í gjár, hóast spælið ikki var serliga sannførandi**

EB/STREYMUR-B71
*Uni Holm Johannesen*
*post@sosialurin.fo*

Tað gongur ongan veg hjá sandoyingum. Í gjár taptu B71 fyri áttandu ferð í ársins útgávu av Formuladeildini, tá teir vitjaðu í Streymnesi. Ikki tí, tað var einki væntað av gestunum á útivølli móti nýkosnu steypavinnarunum. Men tað hevur ikki eydnans sandoyingunum at fingið fleiri enn eitt stig í seinastu sjey dystunum. Í fleiri av dystunum hevur munurin verið lítil, men talan kann ikki verða um óhepni hvørja ferð.

### Smalur hópur

B71 stóð fyri mest óvæntaða úrslitinum í farna kappingarár. Fótbóltsáhugaðu spáddu, at sandoyingarnir ikki fingu fleiri enn 10 stig, men tá avtornaði lógu teir oman fyri niðurflytingarstrikuna. Útlendingarnir í felagnum stóðu seg sera væl, har serliga Clayton Soares loysti uppgávuna sum framherji til fulnar. 11 ferðir var hann skrásettur sum málskjútti.

Brasiliumaðurin hevur tó ikki funnið sama máltevið í ár. Ymsar dystir hevur hann verið noyddur at røkja aðrar uppgávur. Men verður hugt at máltindinum, so hevur Soares bara skotið tvey mál í ársins útgávu av Formuladeildini. Eisini er Símin Hansen nú at síggja á høgra vongverjanum.

Eli Hentze, venjari, hevur ikki serliga nógv fólk at taka av á Sandoynni. Millum annað vóru Fabio Vieira og Rasmus Nielsen ikki við í hópinum í Streymnesi í gjár. Fleiri av yngru leikarunum hava gjørt vart við seg seinasta árið, men tað eru eisini nakrir, ið ikki standa seg í Formuladeildini. Men øðrvísi kann tað ikki verða.

### Málini

EB/Streymur var væl meira á bóltinum í gjár, men tað var eisini mest sum tað. Fyrstu 80 minuttirnar av dystinum hevði heimaliðið tvær veruligar royndir á málið hjá gestunum, og tvær ferðir noyddist Símun Rógvi Hansen í málið eftir bóltinum. Bárður Olsen legði sundalagsmenn á odda við framúr langskoti, sum eisini var tað einasta áskoðararnir við Margáir kundu frøast um í fyrra umfarinum.

Levi Hanssen økti um leiðsluna miðskeiðis í seinna hálvleiki. Sorin Anghel fekk ríkiligt av plássi í brotsteiginum, og tá sandoyingar bíðaðu við at taka bóltin av honum, sendi rumenin móti málinum. Málverjin hálvbjargaði skotroyndini. Levi Hanssen fekk eftir stríð við mótstøðuleikarar skumpa bóltin seinasta pettið um málstrikuni. Málið bleiv tó skrásett sum sjálvmál.

### Tvær ferðir Balok

Tað hevur framvegis ikki eydnast Marcel Balok at koma á máltalvuna í Formuladeildini. Í gjár hevði hann tveir gyltar møguleikar, men eydnan var ikki við framherjanum. Fyrst royndi hann seg úr ellivu metrum, men skotið var lítið sannførandi. Símun Rógvi Hansen tveitti seg til vinstru og hevði bóltin í føvninginum. Sekundvísarin var ikki meira enn komin einu ferðina runt, áðrenn Clayton Soares hevði minkað um munin. Hetta var eftir upplegg frá Símini Hansen úr vinstru.

Balog hugsaði helst sítt hesa løtuna, men tíðin var ov knøpp til, at B71 kundi hótta leiðsluna hjá heimaliðnum av álvara.

Balog hevði aftur møguleikan stutt áðrenn dystarlok, men staddur fáar metrar frá málinum, sendi hann framvið, hóast málverjin var farin úr málinum.

Lítið sannførandi avrik av EB/Streymi, men teir fingu tvey mál, og tað varð nógmikið. Á áskoðaraplássunum snúði prátið seg mest um leygardagin, meðan tey ongantíð av álvara blivu bitin av dystinum. Fólk høvdu eisini á munni, hvør nú skal steðga sundalagsmonnum, tá ein vissur Peter Foldgast kemur til landið ...

## Eingin vandi

Bárður Olsen legði EB/Streym á odda fyri framúr langskoti í Streymnesi í gjár. Hann heldur ikki, at leiðslan var í vanda.

- Vit høvdu fullkomiliga tamarhald á støðuni. Hóast teir minka um munin, so hava vit tveir stórar møguleikar eftir tað. Har aftrat misnýta vit brotspark, tá vit eru á odda við tveimum.

Nógv verður prátað um Peter Foldgast í løtuni. Tit síggja uttan iva fram til, at hann kemur til landið?

- Sjálvsagt. Hann verður helst ein stórur styrkur. Arnbjørn Hansen skjýtur eisini eina rúgvu av málum í løtuni, og Foldgast er jú eisini málrevur. Vónandi fáa teir tað at rigga, staðfestir Bárður Olsen.

## Teir brúka sínar kjansir

Eli Hentze, venjari hjá B71, metti, at dysturin var javnur.

- EB/Streymur var meira á bóltinum, men sæð burtur frá seinastu minuttunum, so høvdu teir fáar málmøguleikar. Vit spældu rímaliga væl, men í seinasta triðinginum av vøllinum riggaði einki. Teir taka av møguleikunum, teir fáa, og tað er eisini tað, sum ger, at sundalagsmenn eru oddalið.

Tit hava fingið eitt stig í seinastu sjey dystunum. Skála fekk stig í gjár, so fjarstøðan til teir vaks eisini?

- Vit kunnu av góðum grundum bara gera nakað í okkara dystum. Vinna vit tveir dystir upp í slag, so eru vit við aftur. Men stigini skulu sjálvsagt koma í hús sum skjótast, sigur Eli Hentze.